# 1 Tíðarfreistir

Nær er kravið um at senda talgildar rokningar lógarfest? Frá 1. Januar 2018.

--

Hví tosa summi um 1. Apríl 2018 sum eina freist? Tí Fíggjarmálaráðið hevur sett veitara, sum skal vera rokningahandfaringarstøð hjá landinum, 1. Apríl 2018 sum evstu freist fyri at kunna senda talgildar rokningar av slagnum OIO-UBL víðari til landið. OIO-UBL er eitt nýggjari og betri slag av talgildum rokningum.

# 2 Tøknilig snið - ymiskt

--

Hvørjar talgildar rokningar verða sendar landinum í dag? Tær eru av slagnum OIO-XML. Rokningar av slagnum OIO-UBL hava fleiri møguleikar fyri at hefta skjøl við, enn OIO-XML hevur. Stovnarnir eru vanir við at móttaka OIO-XML rokningar í dag.

--

Skulu veitarar, sum senda talgildar rokningar til landið, hava eitt EAN/GLN-nr? Nei – føroyskar loysnir kunnu brúka v-talið hjá veitaranum og danskar loysnir kunnu brúka eitt tillagað CVR-nr, sum er 00 + føroyska v-talið. T.d. 00343269, um tað var Gjaldstovan, sum skuldi senda við danskari loysn.
Tað eru almennu stovnarnir, sum hava ella nýta EAN/GLN-nr at senda til. Tað hevði borið til at senda til v-talið hjá almennu stovnunum, um sendiloysnin er føroysk. EAN/GLN verður nýtt, enn, so bara eitt virði skal upplýsast fyri veitarum.

# 3 Tillaga roknskaparskipan ella brúka fakturaportal?

--

Skulu veitarar tillaga roknskaparskipan sína, so teir kunnu senda talgildar rokningar? Nei – tað ber til at brúka ein rokningaportal, har tú skrivar rokningina av nýggjum og møguliga heftir pdf-skjøl við.

--

Hvørjir rokningaportalar eru? Vit nevna Rokningaportalin hjá Elektron; fakturablankettina hjá virk.dk og rokningaportalin www.sproom.net. Vegleiðingin til fakturaservice.dk er heldur gomul.

--

Hvat ger veitari, sum ynskir at tillaga føroysku roknskaparskipan sína? Hann tekur eitt prát við:

- Formula: Navision
- Stýr: Navision
- Nav2day: Navision
- Nema: Lundin
- Ejvind Gærdbo: Sirius – arbeiðir við at gera eina loysn.

Veitari velur eisini, um hann brúkar Elektron (Rokningadepilin/Mínrokning) ella FarPay sum samskiftisveitaran, sum sendir talgildar rokningar víðari til landið.

--

Eru aðrir mátar at senda talgildar rokningar enn tillaging av egnari roknskaparskipan ella at nýta rokningaportalar? Veitarar, sum nýta roknskaparskipanir á alnótini ("cloudloysnir") hava ofta ein sendara til talgildar rokningar innbygdan. T.d. er ein NemHandel-sendari í hesum skipanum:

- E-conomic.dk
- Dinero – sum líkist e-conomic.dk.

Nú eigur norska Visma-konsernin bæði e-conomic.dk og Dinero. Umframt Stellar/Mamut, Summa Summarum og vist Sproom eisini.

--
Eru veitarar, sum vit vita lættliga kunnu senda talgildar rokningar úr egnari skipan? Ja, tey, sum brúka cloudloysnir (e-conomic.dk, Dinero, Admind). Ein listi kann verða lagdur út, har slíkir kandidatar verða nevndir. Ella sendur teim stovnum, sum biðja um hann.

## 4 Munur á ljóslisnum rokningum og talgildum rokningum?

--
Hvussu kann eg vita, um ein rokning er talgild? Tú sært í Leiðslukunning, at fakturaikonirnar eru gráar, har ljóslisnar rokningar eru bláar. Í Rokningaverkgongdarskipanini sært tú, at viðheftu skjølini fyri talgildar rokningar altíð síggja líka út, óansæð hvør veitarin er.

Heldur Gjaldstovan fram at ljóslesa rokningar frá smáum veitarum, sum bert senda fáar rokningar til landið? Ja, Gjaldstovan heldur fram at ljóslesa rokningar frá veitarum, sum senda fáar rokningar. Gjaldstovan heldur fram at ljóslesa rokningar frá londum, sum ikki hava møguleika at senda talgildar rokningar í UBL-sniðinum. Vit kenna ikki "minstamark" enn.

## 5 Kunning - ymiskt

Hvat ger Gjaldstovan á kunnandi økinum um talgildar rokningar? Gjaldstovan fer at seta seg í samband við allar føroyskar veitarar, sum senda meira enn vist tal av rokningum. Hesir fáa kunning um, hvørjar kundar teir hava hjá landinum, og hvat GLN-nr hoyrir til hvønn kunda hjá teimum. Sagt verður frá møguleikunum at tillaga roknskaparskipan ella at brúka portalloysn. Sær Gjaldstovan, at veitarin brúkar bókhaldsskipanir sum e-conomic.dk og Dinero, vil Gjaldstovan vegleiða um uppsetan av talgildari fakturering. Tá er einki niðasta mark fyri, at veitarin skal senda talgildar rokningar. Gjaldstovan kunnar eisini um, at Tórshavnar Kommuna ynskir talgildar rokningar – og harvið verður kundaskarin, sum er viðkomandi fyri einstaka veitaran at senda talgildar rokningar til, størri.
--
Fer Gjaldstovan at gera eitt meira breitt átak mótvegis veitarum? Ja, saman við Vinnuhúsinum verður kunningarátak vent móti veitarum. Tað átakið verður umframt tað beinleiðis samskiftið, sum fer at vera.
--
Hvat vil Gjaldstovan við at fáa verandi pdf-rokningar (sum eisini eru "manuellar") við postinum:
- At síggja, um veitarar, sum kunnu senda talgildar rokningar, ikki senda talgildar rokningar til allar sínar almennu kundar: og taka samband við veitaran um tað
- At síggja, um veitarar, sum senda talgildar rokningar, eisini senda pdf-teldupostar: at biðja veitarar gevast við at senda pdf-rokningar, tí tað skapar iva um, hvørt rokning er móttikin talgilt
- At síggja veitarar, sum senda nógvar rokningar, men sum ikki senda talgilt enn: fara miðvíst eftir slíkum veitarum

Fráboðanin um, at rokning@gjaldstovan.fo varð tikin úr nýtslu, var ætlað almennum stovnum, sum skulu broyta mannagongdir í 2018 – fráboðanin var ikki ætlað veitarum, sum rokning@gjaldstovan.fo ikki var ætlað.
--
Hvørjar veitarar verður arbeitt konkret við í løtuni fyri at fáa talgildar rokningar:
- Blika/JB Trade væntaði at verða klárur 1. Januar 2018
- TAKS – til allar tollrokningar (vinnugluggin) – arbeiða við at verða klár 1. Januar 2018
- Auto: kann senda talgildar rokningar, men avbjóðingar eru við koyriseðlinum (viðheft skjøl ella onnur loysn)
- Safari Transport: kann senda talgildar rokningar, men skal kunna senda viðheft skjøl. Bíðar eftir OIO-UBL
- Samskip: kannar møguleikarnar